# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 18. apríl 2018
Mál nr.: 18/00095
Málsviðgjørt:

**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um at einskilja P/F Postverk Føroya**

## Uppskot til

## Løgtingslóg
## um
## at einskilja P/F Postverk Føroya

**§ 1.** Landsstýrismaðurin fær heimild til at selja partapeningin í P/F Postverk Føroya.

**§ 2.** Landsstýrismaðurin setir sum treyt í sambandi við søluna, at P/F Postverk Føroya framhaldandi umsitur einkarætt landsins og skyldu landsins til postflutning sambært løgtingslóg um postvirksemi í eitt 10 ára tíðarskeið galdandi frá yvirtøkudegnum.

**§ 3.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 90 frá 20. desember 2004 um at stovna partafelag til at reka postvirksemi.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Endamálið við uppskotinum er at útvega landsstýrismanninum materiella heimild til at einskilja P/F Postverk Føroya.

Síðani Postverk Føroya í 2005 varð umskipað til P/F Postverk Føroya, er marknaðurin bæði í Føroyum og úti í heimi broyttur, og virksemið hjá felagnum tí eisini munandi broytt. Ein alsamt størri partur av inntøkum felagsins koma frá virkisøkjum, ið ikki eru fevnd av veitingarskyldu landsins - virkisøki, har Posta er í beinleiðis kapping við privat vinnurekandi. Tá hugt verður eftir postvirkseminum í øðrum londum sæst, at postverkini í fleiri londum seinnu árini eru blivin einskild, og í øðrum londum verða fyrireikingar gjørdar til einskiljing.

Mett verður, at grundgevingarnar, sum vóru fyri, at landið er eigari av P/F Postverk Føroya, ikki í sama mun eru til staðar longur, og tí verður skotið upp, at landið fer undir eina tilgongd at selja felagið.

Orsøkirnar fyri at einskilja P/F Postverk Føroya eru hesar:

- At hava greitt mark millum alment og privat virksemi innan flutning í Føroyum.
- At minka váðan hjá landinum, sum er við ogn í fyritøkum, sum virka í fríari kapping og harvið váðan hjá pengum skattgjaldarans.
- At kapitalisera virðini í felagnum.
- At tryggja felagnum betri rásarúm í arbeiðinum og at tryggja felagnum frítt at arbeiða við ognum og virðum felagsins við menning og vøkstri fyri eyga.

*Gongdin hjá P/F Postverk Føroya higartil*

Tá virksemið hjá almenna stovninum, Postverk Føroya, í 2005 varð lagt í P/F Postverk Føroya vóru grundgevingarnar fyri umskipanini m.a., at hetta vóru betri hóskandi karmar fyri virksemið hjá Postverki Føroya, sum virkaði á einum marknaði við øktari frælsisgering (liberalisering), kapping og altjóðagering. Dentur varð lagdur á, at Postverk Føroya skuldi rekast á handilsligum grundarlagi, og fíggjarliga, skattliga og roknskaparliga í mest møguligan mun javnstillast við privatar fyritøkur. Eisini varð dentur lagdur á, at P/F Postverk Føroya skuldi kunna stovna dótturfeløg. Tørvurin á at skapa betri karmar íkom m.a. av tí, at kapping var á pakkaøkinum og blaðútberingini, og útlit vóru fyri kapping á øðrum økjum eisini. Fyrrverandi einkarfeløg úti í heimi høvdu tá verið fyri einari ávísari lækking í mongdini av brøvum, orsakað av kapping og øktari nýtslu av elektróniskum samskifti. Keyparin av posttænastum kravdi góða tænastu til rímiligan prís, og tænastur snikkaðar til teirra tørv. Tá hugt varð eftir postverkunum í grannalondunum og runt um í Europa sást, at umskipan til partafeløg longu var farin fram har. Partafelagsformurin varð eisini mettur at lætta um samstarvsmøguleikarnar hjá Postverki Føroya.

Nógvar broytingar vórðu framdar í sambandi við umskiftið frá stovni til partafelag. Hesi árini broyttu fortreytirnar seg munandi, og tí mátti felagið beinanvegin tillaga seg tær áhaldandi broyttu umstøðurnar. Sølan fall úr 121 mió. kr. í 2006 niður í 89 mió. kr. í 2012, og rakstraríkastið í árunum 2007-2011 var negativt. Seinnu árini er gongdin vend. Rakstrarúrslitið var positivt í 2012, og felagið gav yvirskot fyri skatt í 2013. Árini 2013-2017 hevur felagið havt yvirskot.

Virksemi felagsins er samansett av posti, frímerkjum og frakt. Virksemið er mest í Føroyum, men partur av virkseminum og søluni er uttanfyri Føroyar - tó mesta við tilknýti til føroyskan flutning. Partur av virkseminum er áløgd veitingarskylda uttan kapping (monopol), partur er áløgd veitingarskylda, tó í kapping við aðrar, og partur av virkseminum er flutningur í fríari kapping.

Fyritøkan er framhaldandi í einari stórari broytingartilgongd, har tað mesta av brøvum, frímerkjaútgávu og lýsingarbløðum við tíðini væntast at hvørva, meðan frakt og 3PL (triðja parts flutningur, t.e. flutningur og/ella goymsla og stýring av hesum, útveitt av fyritøku til logistikkfelag) væntast at vaksa.

P/F Postverk Føroya hevur, sum sítt týdningarmesta virksemi, havt veitingarskyldu at bera út post um alt landið og til allar kundar. Men nøgdin, ið er fevnd av veitingarskylduni, minkar í stórum, meðan tey virkisøki, sum eru í kapping við privatar aktørar, vaksa.

P/F Postverk Føroya skal sum eitt partafelag rekast á handilsligum grundarlagi. Tá tann parturin av virkseminum hjá felagnum, ið er fevndur av veitingarskylduni, minkar í stórum, og virkisøkini, sum eru í fríari kapping, vaksa, kann almenni eigaraskapurin lættliga gerast ein byrða fyri felagið, og kappingarstøðan verður óhóskandi mótvegis kappingarneytunum. Tí verður mett, at fleiri viðurskifti tala fyri, at broytingar verða gjørdar viðvíkjandi eigaraviðurskiftunum í felagnum, og tí verður skotið upp, at landsstýrismaðurin fær heimild til at selja felagið.

*Landið sum eigari*

Sum meginregla verður vinnuligt virksemi á handilsligum grundarlagi rikið av privatum, men í onkrum førum velur landið at vera eigari av vinnufeløgum, og tá er vanligt at nýta hesar grundgevingarnar fyri, at landið er eigari:

- Tamarhald á týðandi undirstøðukervi
    - Tað eru partar av undirstøðukervinum, sum eru serliga týðandi fyri samfelagið, og tað kunnu tí vera politisk ynski um at hava ræðið á undirstøðukervinum gjøgnum vinnufelag, sum landið eigur.
- Veitingartrygd
    - Tað kunnu vera vørur ella tænastur, sum tað er samfelagsliga ynskiligt verða framleiddar, men har tað eru fáir ella eingin privatur veitari. Ein tílík støða skapar ótryggleika um veitingartrygdina, umframt at tað kann hava við sær stóran framleiðslukostnað. Landið kann tí ynskja at varðveita ræðið á framleiðsluni.
- Handilsliga grundarlag felagsins er grundað á, at landið eigur
    - Hetta eru feløg, sum vanliga loysa uppgávur, sum annars skuldu verið loystar av t.d. einum almennum stovni, men har landið hevur valt at leggja uppgávuna í vinnufelag út frá effektivitetsatlitum.
- Onnur atlit
    - At landið er eigari kann vera grundað á onnur samfelagslig atlit.

Tá ið samanum kemur, er endamálið hjá landinum, sum eigara, mest møgulig virðisskapan fyri samfelagið soleiðis, at tilfeingið (kapitalur, arbeiðsmegi o.a.) verður nýtt, har tað ger mest gagn.

Fyri hvørt felag sær eigur tað at verða mett um, hvørt tað er skilabesta loysnin, at landið eigur, ella tað eru onnur amboð, sum eru meira hóskandi at røkka endamálinum. Yvirhøvur hevur gongdin í grannalondunum verið, at uppgávur, har tað eru serlig almenn áhugamál uppi í, verða loystar við øðrum amboðum, m.a. konsessjónum/loyvum og lóggávu. Liberaliseraðir marknaðir, nýggj tøkni og økt kapping kunnu gera, at ymisk almenn mál kunnu verða røkt meira effektivt gjøgnum marknaðin, lóggávu og treytir í konsessjón ella loyvi ella við avtalu um útveiting.

Um endamálið kann røkkast við øðrum amboðum enn, at landið er eigari, eigur avvarðandi landsstýrismaður at taka støðu til, hvørt virksemið skal verða selt.

Grundgevingarnar fyri at selja P/F Postverk Føroya og ætlanirnar í hesum sambandi verða nærri lýstar í uppskotinum undir pkt. *1.3 Endamálið við uppskotinum* og í skjali 1.

## 1.2. Galdandi lóggáva

Við heimild í løgtingslóg nr. 90 frá 20. desember 2004 um at stovna partafelag at reka postvirksemi, stovnaði landsstýrismaðurin tann 29. desember 2004 P/F Postverk Føroya. Lógin heimilaði landsstýrismanninum at leggja virksemið í partafelag, men lógin setur forboð móti, at partabrøv kunnu avhendast v.m. soleiðis, at onnur enn landið gerast eigarar av partabrøvum í felagnum.

Landsstýrismaðurin legði við heimild í løgtingslóg nr. 76 frá 27. mai 2005 virksemi, ogn, skuld, rættindi og skyldur hjá Postverki Føroya í P/F Postverk Føroya. Í lógini eru neyvar ásetingar um rættindi og skyldur hjá Postverki Føroya mótvegis teimum starvsfólkunum, sum vóru starvsett á stovninum, tá umleggingin til P/F Postverk Føroya fór fram.

P/F Postverk Føroya hevur síðani 7. juni 2004 havt konsessión/loyvi til at reka vinnuligan postflutning.

Galdandi lóggáva fyri vinnuligan postflutning er ásett í løgtingslóg nr. 135 frá 18. oktober 2001 um postvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 42 frá 7. mai 2010.

Sambært løgtingslóg um postvirksemi, sum kom í gildi í 2001, og viðmerkingunum til lógina er endamálið at skapa fortreytir fyri frælsari kapping á økinum eftir 2003.

Harumframt er endamálið at tryggja øllum landsins íbúgvum, at postflutningur verður skipaður fyri rímiligan prís við góðari dygd, at áhugamál viðskiftafólksins verða vard, undir hesum serliga postloyndin, at postflutningur verður lagaður eftir skiftandi tørvi. Almennu áhugamálini hjá landinum viðvíkjandi postflutningi eru harvið løgskipað og tryggjað við løgtingslóg um postvirksemi, og kunnu almennu áhugamálini í felagnum tí verða røkt, hóast landið ikki er eigari av felagnum.

Landið hevur sambært lógini einkarrætt til postflutning av innlendis adresseraðum brøvum og adresseraðum brøvum, send til Føroya og úr Føroyum, at geva út frímerki, seta postkassar upp á alment atkomuligum støðum, og at nýta postbúmerkið. Undantikið frá einkarættinum er postflutningur av adresseraðum príslistum, bóklingum, bløðum og øðrum prentaðum sendingum, líkar til innihalds, og sum eru í glærum bjálva, og kurérpostur.

Í kunngerð nr. 51 frá 19. august 2004 um einkarætt og skyldur landsins til postflutning er ásett, hvat einkarættur landsins fevnir um. Einkarætturin fevnir um postflutning av innlendis

adresseraðum brøvum og adresseraðum brøvum, send úr Føroyum og til Føroya, sum viga til og við 100 gramm.

Sambært viðmerkingunum til løgtingslóg um postvirksemi koma sendingar omanfyri 20 kg ikki undir lógina.

Landið hevur skyldu til at tryggja postflutning av adresseraðum brøvum, pakkum og blindalestri o.ø. um alt landið og at tryggja postflutning frá sendarum uttanlands til móttakarar í Føroyum og frá sendarum í Føroyum til móttakarar í útlondum.

Landsstýrismaðurin umsitur einkarætt landsins til postflutning og tryggjar, at skylda landsins til postflutning verður hildin. Landsstýrismaðurin kann veita loyvi til postflutning bæði við og uttan einkarætt.

Tá landsstýrismaðurin veitir loyvi, kunnu treytir verða lagdar við, m.a. um posthús, skyldu fyri egnan kostnað at taka lut í altjóða samstarvi um postflutning, skyldu at greiða serstakar uppgávur, hóast tær einki kasta av sær ella geva hall og rindan av loyvisgjaldi.

Posteftirlitið, ið varð sett á stovn í 2002, hevur vegna landsstýrismannin eftirlit við, at konsessiónshavarin heldur treytirnar í postvirksemislógini, kunngerðum og í sjálvari konsessiónini. Posteftirlitið kann geva konsessiónshavara boð um at yvirhalda treytirnar í konsessiónini og postvirksemislóggávuni annars. Dagligar ella vikuligar bøtur kunnu verða álagdar til viðurskiftini eru fingin í rættlag. Konsessiónin kann verða tikin aftur, um loyvihavarin ikki yvirheldur lógina, kunngerðir ella aðrar reglur, givnar við heimild í lógini, ella loyvistreytirnar.

Rættindi sambært konsessiónini kunnu ikki verða flutt øðrum uttan so, at landsstýrismaðurin frammanundan hevur givið skrivligt loyvi til tess. Úttøka ella útpanting kann ikki fremjast í rættinum sambært konsessiónini, og gongur rætturin ikki inn í konkursbúgv loyvishavarans.

*Konsessión*
P/F Postverk Føroya hevur sambært § 8, stk. 1 í postvirksemislógini frá landsstýrismanninum fingið konsessión til vinnuligan postflutning. Konsessiónin er at skilja sum eitt loyvi og ikki sum ein einkarættur. Tað fylgir av konsessiónini, at felagið hevur skyldu til at tryggja skyldur landsins sambært § 4 í postvirksemislógini til postflutning um alt landið av:

1. adresseraðum brøvum,
2. adresseraðum príslistum, bóklingum, bløðum og øðrum prentaðum sendingum, eins til innihalds, sum ikki eru í bjálva,
3. tíðindabløðum, dag-, viku- og mánaðarbløðum og tíðarritum,
4. adresseraðum pakkum,
5. blindalestri, og
6. peningaflytingum

Eisini skal tað vera gjørligt at senda brøv og pakkar sum virðispost, harumframt brøv sum innskrivaðan post.

Sambært konsessiónini hildið saman við postvirksemislógini og kunngerð nr. 51 frá 19. august 2004 um einkarætt og skyldur landsins til postflutning hevur P/F Postverk Føroya við

ávísum undantøkum skyldu til at tryggja flutningsskyldu landsins av brøvum upp til 100 g og addresseraðum posti upp til 20 kg. Álagt er, at postflutningur, ið er fevndur av flutningsskylduni, skal veitast til eins prísir um alt landið.

P/F Postverk Føroya skal tryggja postflutning frá sendarum uttanlands til móttakarar í Føroyum og frá sendarum í Føroyum til móttakarar í útlondum. Í konsessiónini eru eisini ásettar treytir viðvíkjandi útbering, kunning um almennar viðskiftatreytir, ársfrágreiðing, loyvisgjald o.a.

Konsessiónin hevur eisini sum endamál at skapa fortreytir fyri kapping við krøvum um m.a. prísásetingarmeginreglur og roknskaparreglur.

Sambært treytunum í konsessiónini ásetir Posteftirlitið í samráð við P/F Postverk Føroya hámarksprísir fyri ávísar tænastur, sum eru fevndar av einkarætti landsins og skyldu landsins til postflutning. Prísir og gjøld skulu vera í samsvar við galdandi kappingarrætt.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at útvega landsstýrismanninum heimild til at selja allan partapeningin í P/F Postverk Føroya. Eisini er endamálið við uppskotinum at tryggja, at málið fær eina nøktandi politiska viðgerð, áðrenn avgerð verður tikin um at fara undir eina tilgongd at einskilja P/F Postverk Føroya.

Í frágreiðing, sum er løgd við uppskotinum sum fylgiskjal 1, verður ein lýsing gjørd av virksemi felagsins, vánirnar fyri teir marknaðir, ið felagið arbeiðir á, búskaparligu gongdini í felagnum, virðið á felagnum og um ognir felagsins o.a. Harvið er eisini grundarlagið undir ætlan landsstýrismansins at selja felagið lýst.

Høvuðsgrundgevingarnar fyri, at landið eigur at fara undir eina tilgongd at selja P/F Postverk Føroya, eru:

- Nøgdin, ið umfatar veitingarskylduna minkar í stórum, og onnur virkisøki vaksa. Vaksandi virkisøkini eru øki, sum eru í beinleiðis kapping við privatar aktørar.
- P/F Posta skal sum eitt partafelag rekast á einum handilsligum grundarlagi.
- Almenni eigaraskapurin kann vera ein byrða fyri felagið, og ein óhóskandi kappingarstøða hjá kappingarneytunum.
- Felag, virkandi í kapping við privatar aktørar, eigur ikki at hava tað almenna aftanfyri seg. Tað kann skapa ójavna kapping við óhepnum avleiðingum.
- Felagið hevur tørv á teimum fyrimunum, sum felagið kann fáa á einum fríum marknaði við m.a. strategiskum samstarvi og atgongd til kapital.
- Við tað, at tað almenna rekur vinnuligt virksemi, átekur tað almenna sær váðan, sum er í hesum virksemi.

Mett verður, at tíðin at fara undir eina sølutilgongd er tann rætta, tí:

- Váðin í fyritøkuni er framhaldandi høgur við tað, at brøvini verða burtur og P/F Postverk Føroya innan logistikk kann verða útkonkurrerað av størri útlendskum fyritøkum. Hendan váðan eigur tað almenna ikki at átaka sær.
- P/F Postverk Føroya er ein væl rikin fyritøka, ið hevur havt yvirskot áðrenn avskrivingar frá og við 2012 og yvirskot frá og við 2013, t.e. 5-6 ár íroknað 2017.
- Felagið er væl konsoliderað, og tað er skynsamt at selja í einum sterkum búskapi.

*Søluháttur og -tilgongd*
Ætlanin er at selja P/F Postverk Føroya í einum til privatar íleggjarar í Føroyum. Tað verður mett at hava týdning fyri virðið í felagnum, at tað ikki verður býtt upp í partar, sum verða seldir hvør sær. Eisini fyri at tryggja, at postskyldurnar framhaldandi verða røktar væl og virðiliga, verður felagið selt samlað soleiðis, sum felagið virkar í dag, t.e. við postvirksemi, frímerkjaútgávum og frakt. Allar ognir hjá P/F Postverk Føroya eru eftir ætlan við í søluni. Tað eru bygningar, skipanir og dótturfeløg o.a.

Veitingarskyldan verður framhaldandi partur hjá felagnum og hongur saman við rættinum til konsessión til postflutning og frímerkjaútgávu. Felagnum verður álagt at røkja skyldur landsins til postflutning sambært postvirksemislógini, og verður felagnum heimilað at framleiða og selja frímerki í minsta lagi í 10 ár við møguleika fyri leingjan. Konsessiónin og treytirnar í hesari fylgja við í ávíst áramál, eins leingi og loyvi er givið at framleiða frímerki. Síðan kann konsessiónstreytaða virksemið bjóðast út. Konsessiónsbundni parturin fer framhaldandi at vera undir eftirliti av Posteftirlitinum.

At konsessiónin er galdandi í 10 ár verður roknað inn í søluprísin, tá felagið verður selt. Tá veitingarskyldan á henda hátt verður seld saman við restini av felagnum slepst undan at virðisáseta ella bjóða út veitingarskylduna serstakt. Virðið ella kostnaðurin av veitingarskylduni gerst hervið partur av samlaðu søluni av P/F Posta. Virðið á veitingarskylduni er óvist, og er tengt at gongdini á marknaðinum komandi árini. Verður stór niðurgongd í nøgdini av posti, ið er fevnd av veitingarskylduni, gerst veitingarskyldan ein útreiðsla. Í slíkum førum er vanligt, at tað almenna veitir stuðul til at røkja eina slíka uppgávu. Um nøgdin ikki fellur ella hækkar hevur veitingarskyldan eitt ávíst virði. Stór óvissa er tengd at júst hesum virkseminum hjá Posta.

Parturin av virkseminum hjá felagnum, sum er fevnt av løgtingslóg um postvirksemi, verður sostatt framhaldandi undir eftirliti av Posteftirlitinum soleiðis, at krossstuðul ikki fer fram millum tað konsessiónsbundna virksemið og virksemi í fríari kapping. Posteftirlitið fer somuleiðis at áseta treytir fyri tænastustøði og prísir.

Tilgongdin at einskilja P/F Postverk Føroya verður fyrireikað og skipað eftir leiðreglunum hjá Føroya Landsstýri - *Leiðreglur um at einskilja fyritøkur landsins.*

Sambært leiðreglunum er tað avvarðandi landsstýrismaður, ið hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja einskiljing av einstøku fyritøkuni samsvarandi Løgtingsins vilja.

Ein einskiljingarnevnd verður skipað, og í henni sita løgmaður og landsstýrismenninir í ávíkavist fíggjarmálum og vinnumálum. Harafturat verður ein embætisbólkur skipaður, har umboð fyri Løgmansskivstovuna, Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Fíggjarmálaráðið sita. Uppgávan hjá bólkinum er at fyrireika mál at leggja fyri einskiljingarnevndina, ið leypandi verður kunnað um gongdina í málinum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið fer saman við nevnd og stjórn í felagnum at standa fyri søluni. Í sambandi við fyrireikingarnar verða uttanhýsis ráðgevar brúktir til m.a. at gera prospekt viðvíkjandi felagnum, virðismetingar og aðrar greiningar.

Felagið verður eftir ætlan boðið til sølu frítt á marknaðinum uttan aðrar treytir enn omanfyri nevndar viðvíkjandi konsessión. Landsstýrismaðurin vil í sambandi við søluna tryggja sær, at P/F Postverk Føroya framhaldandi verður ein føroysk fyritøka. Felagið er natúrligt heimahoyrandi í Føroyum og kann virksemið ikki á skilagóðan hátt flytast av landinum.

Í sambandi við søluna verður mett um møguligar áhugaðar keyparar, og við gjøgnumgongd verður ein heildarmeting gjørd av, hvør leisturin verður, og verður mett um evnini hjá áhugaðum keyparum at reka fyritøkuna víðari við teimum skyldum, fyritøkan framvegis hevur.

Starvsfólk, ið starvast í felagnum, tá tað verður selt, varðveita í sambandi við søluna síni rættindi sambært verandi sáttmálum. Tað verði seg eftir kollektivum sáttmála, sum tænastumenn ella einstaklinga sáttmála við P/F Postverk Føroya.

*Skyldan hjá landinum at tryggja postflutning*
Við løgtingslóg um postvirksemi hevur landið skyldu til at tryggja, at hóskandi postflutningur verður tryggjaður øllum landsins íbúgvum, at postflutningur verður skipaður fyri rímiligan prís við góðari dygd, at áhugamál viðskiftafólksins verða vard, herundir serliga postloyndin, at postflutningur verður lagaður eftir skiftandi tørvi, og at fortreytirnar verða skaptar fyri frælsari kapping á økinum eftir 2003.

Við tað, at landsstýrismaðurin sambært løgtingslóg um postvirksemi hevur heimild til at áleggja postvinnurekandi treytir, sum m.a. svara til tær skyldur, ið landið hevur, skuldi tann støðan ikki íkomið, at eingin er at røkja tær skyldir, sum landið hevur sambært lógini .

Í sambandi við søluna av P/F Postverk Føroya verður tað ásett sum ein treyt til keyparan, at hann hevur skyldu til at røkja skyldurnar hjá landinum sambært postvirksemislógini í eitt áramál fram.

Sambært postvirksemislógini hevur landið einkarrætt til postflutning av innlendis adresseraðum brøvum og adresseraðum brøvum, send til Føroya og úr Føroyum, at geva út frímerki, seta postkassar upp á alment atkomiligum støðum, og at nýta postbúmerkið. Undantikið frá einkarrættinum er postflutningur av adresseraðum príslistum, bóklingum, bløðum og øðrum prentaðum sendingum, líkar til innihalds, og sum eru í glærum bjálva, og kurérpostur.

Landið hevur skyldu til at tryggja postflutning av adresseraðum brøvum, pakkum og blindalestri o.ø. um alt landið og at tryggja postflutning frá sendarum uttanlands til móttakarar í Føroyum og frá sendarum í Føroyum til móttakarar í útlondum.

Landsstýrismaðurin umsitur einkarætt landsins til postflutning og tryggjar, at skylda landsins til postflutning verður hildin. Landsstýrismaðurin kann veita loyvi til postflutning bæði við og uttan einkarætt.

Tá landsstýrismaðurin veitir loyvi, kunnu treytir verða lagdar við m.a. um posthús, skyldu fyri egnan kostnað at taka lut í altjóða samstarvi um postflutning, skyldu at greiða serstakar uppgávur, hóast tær einki kasta av sær ella geva hall og rindan av loyvisgjaldi.

Mett verður ikki, at landið kann fáa trupulleikar av at halda sínar skyldur sambært postvirksemislógini, um P/F Postverk Føroya verður selt, tí landsstýrismaðurin kann sambært § 2 í hesum uppskoti áseta sum treyt í sambandi við søluna, at felagið skal røkja skyldur landsins viðvíkjandi postflutningi sambært postvirksemislógini í eitt 10 ára tíðarskeið. Posteftirlitið hevur vegna landsstýrismannin eftirlit við, at konsessiónshavarin heldur treytirnar í postvirksemislógini, kunngerðum og í sjálvari konsessiónini. Posteftirlitið kann geva konsessiónshavara boð um at yvirhalda treytirnar í konsessiónini og postvirksemislóggávuni.

Misrøkir P/F Posta sínar skyldir við at fremja brot á postvirksemislóggávuna ella treytirnar í konsessiónini kann landsstýrismaðurin sambært postvirksemislógini áleggja dagligar ella vikuligar bøtur, og koma viðurskiftini ikki í rættlag kann landsstýrismaðurin taka konsessiónina aftur.

Postvirksemislógin forðar fyri, at rættindi sambært konsessiónini ikki kunnu verða flutt øðrum, uttan at landsstýrismaðurin hevur givið skrivligt loyvi til tað. Ásett er í postvirksemislógini, at skuldi felagið komið í fíggjarligar trupulleikar, kann úttøka ella útpanting ikki fremjast í rættinum sambært konsessiónini, og rætturin gongur ikki inn í konkursbúgvið hjá loyvishavara.

Harvið er tryggjað, at rætturin sambært konsessiónini fellur aftur til landið, um felagið ikki røkir ella er ført fyri at røkja sínar skyldir sambært konsessiónini.

Posteftirlitið góðkennir prísbroytingar á brøvum, innlendis pakkum, blaðútbering og í heila tikið, har ein tænasta er áløgd. Vørurnar skulu vera prísásettar soleiðis, at tær ikki eru felagnum ein byrða, men skulu heldur ikki ríka felagið. Sambært § 13 í konsessiónini er ásett, at prísirnir skulu vera í samsvari við galdandi kappingarrætt. Hetta merkir, at prísirnir sum meginregla skulu svara til kostnaðin umframt ein rímuligan vinning. Posteftirlitið kann av sínum eintingum krevja greiningar og prísbroytingar. Tá felagið, saman við veitingarskyldu, verður einskilt, fer Posteftirlitið framvegis at hava eftirlit við virkseminum, sum er ávíkavist “skylda uttan kapping” og “skylda við kapping”.

Fyrr ella seinni kann støðan íkoma, at felagið, sum hevur átikið sær skyldurnar hjá landinum til postflutning, ikki longur fær virksemið viðvíkjandi postflutningi at bera seg fíggjarliga, m.a. av teirri orsøk, at nøgdin er blivin so lítil, og skal tænastan varðveitast og prísurin setast eftir útreiðslunum, verður tað ov dýrt fyri brúkaran. Skal ein privat fyritøka átaka sær eina ikki lønandi skyldu, má tað almenna veita henni kompensatión fyri hetta. Umráðandi er tá, at konsessiónin verður boðin út í fría kapping soleiðis, at tann, sum kann gera arbeiði bíligast, t.e. við minst stuðli frá landinum, fær uppgávuna. Hetta er eisini leisturin, ið verður nýttur m.a. tá ávísar rutur hjá Strandferðsluni verða bodnar út, t.d. Mykinesleiðin.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið inniheldur í § 1 eina heimild til landsstýrismannin at selja partapeningin í P/F Postverk Føroya. Mett verður, at tað nágreiniliga er lýst í brotunum omanfyri, hvør nýskipanini við uppskotinum er.

Sambært § 2 setir landsstýrismaðurin í sambandi við søluna sum treyt, at felagið í eitt 10 ára tíðarskeið røkir einkarætt landsins og skyldu landsins til postflutning sambært postvirksemislógini. P/F Postverk Føroya røkir hesar uppgávur í dag sambært konsessión frá landsstýrismanninum, ið er galdandi fyri eitt 2 ára tíðarskeið. Skal landsstýrismaðurin seta slíkar treytir viðvíkjandi veitingarskyldu fyri eitt 10 ára tíðarskeið verður mett, at hetta krevur heimild í løgtingslóg.

Í § 3 er ásett, at lógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og løgtingslóg nr. 90 frá 20. desember 2004 um at stovna partafelag til at reka postvirksemi samstundis fer úr gildi. Løgtingslógin, sum við uppskotinum verður sett úr gildi, hevði sum endamál at heimila landsstýrismanninum at stovna partafelag, hvørs endamál var at reka postvirksemi. Hetta er framt, og tí er tað ikki longur viðkomandi at hava hesa heimild í gildi. Eisini ásetir lógin, at

partabrøvini í felagnum ikki kunnu avhendast o.a., ið ikki er í samsvari við tær ætlanir, sum landsstýrismaðurin nú hevur í sambandi við hetta uppskotið. Tí verður skotið upp at seta løgtingslóg nr. 90 frá 20. desember 2004 um at stovna partafelag til at reka postvirksemi úr gildi.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er sent til ummælis hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, Starvsmannafelagnum, Tænastumannafelagnum, Posteftirlitinum, Kappingareftirlitinum, TAKS, Kommunufelagnum.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

At selja felagið P/F Postverk Føroya førir við sær, at peningur hjá landinum, sum stendur bundin í felagnum, verður loystur. Tað er torført at meta um, hvat landskassin fer at fáa inn í samband við eina sølu. Á s. 21 í fylgiskjali 1 til uppskotið eru metingar gjørdar av virðinum á felagnum.

*Vinningsbýti* – tá landið er eigari av felagnum, fellur eitt møguligt vinningsbýti til landskassan, men tá landið ikki framyvir verður partaeigari, fær landið ikki longur nakað vinningsbýti frá felagnum. P/F Postverk Føroya hevur tó ikki síðan stovnan av almennum partafelagi goldið landinum vinningsbýti, og eru yvirskotini seinastu árini farin til at styrkja eginogn felagsins. Landskassin fær inntøkur frá søluni av felagnum.

*Konsessiónsgjald* – sambært galdandi konsessiónstreytum ber P/F Postverk Føroya kostnaðin av Posteftirlitinum í mun til marknaðarpart av føroyska postmarknaðinum (konsessiónerað + fræls øki sambært postvirksemislógini). Felagið kemur framvegis at bera hendan kostnaðin eftir, at einskiljingin er framd.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Uttanríkis- og vinnumálaráðið røkir ognarlut landsins í P/F Postverk Føroya. Landsstýrismaðurin møtir á aðalfundi, velur nevndina, og fær støðugt kunning um fíggjarligu gongdina og um týðandi hendingar fyri felagið. Tá felagið verður selt, er ikki longur neyðugt at røkja hesa fyrisitingarligu uppgávuna.

Tað er sannlíkt, at tørvur verður á at seta nakað meiri arbeiðsorku av á Posteftirlitinum, eftir at felagið er einskilt. Møgulig eyka arbeiðsorka hjá Posteftirlitinum verður tó fevnd av konsessiónsgjaldinum.

Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna á tann hátt, at tað almenna ikki longur er eigari av einari av stóru fyritøkunum á marknaðinum fyri postvirksemi og frakt.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
P/F Postverk Føroya skal sambært konsessiónini halda tær samtyktir, ið eru bindandi fyri Føroyar, sum gjørdar verða innan altjóða samstarv á postflutningsøkinum í UPU (Universal Postal Union), umframt avtalur í øðrum viðkomandi altjóða felagsskapum av millumtjóða slagi.

Føroyar hava ikki sjálvstøðugan limaskap í UPU, men er Postverk Føroya umboðað av PostNord í UPU. Postverk Føroya og PostNord hava bilaterala avtalu um post, har PostNord avroknar onnur postverk vegna Postverk Føroya. Konsessión og millumlanda avtalur um post kunnu gerast millum almenn og privat postfeløg.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið er ikki viðkomandi fyri hesar tvørgangandi sáttmálarnar:

1) Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS, “Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention”. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar við lóg tann 1. mai 2000.

2) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, ið áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek.
   Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við “Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap”.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting og sektir og ger lógaruppskotið ikki størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið áleggur ikki skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar, sum heimila, at gjald verður álagt.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Uppskotið leggur ikki skyldur á fólk, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu el. líkn.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Uppskotið heimilar landsstýrismanninum at selja P/F Postverk Føroya. Uppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann ella kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn greitt er frá.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greina

**Til § 1**
Ásetingin heimilar landsstýrismanninum at selja partabrøvini í felagnum P/F Postverk Føroya.

**Til § 2**
Tá henda sølan fer fram verður talan um universalsuccessión av partabrøvum. P/F Postverk Føroya hevur júst somu rættindi og skyldur aftan á søluna av partabrøvum, sum felagið hevði áðrenn søluna av partabrøvum, tó bert við øðrum eigarum. Praksis er, at konsessiónin verður givin fyri eitt 2 ára tíðarskeið, og galdandi konsessión hjá P/F Postverk Føroya gongur út tann 31. desember 2018. Ætlanin er, at seta sum treyt fyri søluni, at konsessiónin við rætti til at seta upp postkassar, útgeva frímerki og við veitingarskyldu o.a. skal halda áfram í 10 ár frá yvirtøkudegnum t.e. tí degi, at partabrøvini verða avhendað og keypspeningurin verður goldin seljaranum sambært sáttmála millum partarnar. Konsessiónstreytir verða settar sambært løgtingslóg um postvirksemi, men tá ætlanin er, í sambandi við søluna av partabrøvunum, at seta konsessiónstreytir, verður mett rættast, at heimild til tað verður sett beinleiðis í hesa løgtingslóg.

**Til § 3**
Áseting um gildiskomu. Lógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 90 frá 20. desember 2004 um at stovna partafelag til at reka postvirksemi, ið ikki longur er viðkomandi, og tí verður skotið upp at seta hana úr gildi.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, dagfesting.

**Poul Michelsen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Frágreiðing um einskiljing av P/F Postverk Føroya